

Partur av nýggju nevndini í Føroya Skipara- og Navigatørfelag, sum varð vald á aðalfundinum í felagnum í nýggju og stásiligu felagshúsinum í morgun. Mynd Jan Müller

# Skipara- og Navigatørfelagið í 2015: Eitt hendingarríkt ár

**Jan Müller**

29.12.2015 - 20:25

Oljan.fo

Stórur áhugi var fyri aðalfundinum í Føroya Skipara- og Navigatørfelag, sum varð hildin í nýggja og stásiliga felagshúsinum í Smærugøtu í Havn í morgun. Ikki færri enn 70 limir úr øllum landinum vóru komnir til fundin, har m.a. nýggi formaðurin Annfinnur Garðalíð varpaði ljós á nógva virksemið í felagnum farna árið.

Millum nógv av tí nýggja á fundinum, sum verður hildin millum jól og nýggjár á hvørjum ári, var eisini gestarøðarin, sum var eingin minni enn ein av oddamonnunum í føroyskum politikki, nevniliga Høgni Hoydal, formaður í Tjóðveldi og nú eisini landsstýrismaður í fiskivinnumálum. Hann nýtti høvi til at greiða frá politikkinum hjá nýggju samgonguni á fiskivinnuøkinum og hevði eisini høvið til at svara spurningum frá limunum í hesum elsta fakfelagnum í landinum. Føroya Skipara- og Navigatørfelag verður 120 ár í 2016.

Á aðalfundi felagsins var m.a. nevndarval á skránni.

Í nevndini sita nú:

Ellintur M. Abrahamsen,

Ólavur Biskupstøð,

Kristen Friis,

Niels Nielsen,

Annfinnur Fagraklett,

Jan Haldansen,

Svenning Borg,

Leivur Christiansen,

Jákup Gøthe,

Annfinnur Garðalíð,

og Elias Zachariasen.

Nevndin hevur skipað seg við Annfinni Garðalíð sum formanni og Elias Zachariasen sum næstformanni.

Lesið frágreiðing formansins og annað um aðalfundin á heimasíðuni www.fsn.fo































